Brandstøðin basti olju á Havnarvág

Tað var eitt hendiligt óhapp, at olja lak úr einum russara við Oljukaiuna í Havn sunnudagin.
- Tað gekk betur enn væntað at taka oljuna uppaftur, sigur innsats-leiðarin á Brandstøðini í Havn, Anfinn Reinert

OLJUDÁLKING
Vilmund Jacob sen

Stutt eftir døgurða sunnudagin noyddist Brandstøðin í Havn í hernað við oljusperringum á Havnarvág, tí olja var likin úr einum russara, sum lá við Oljukaiuna og tók olju.

Hetta var eitt hendiligt óhapp. Dagin fyri, teir skuldu taka olju, høvdu teir fingist við trollemmarnar har afturi og uttan, at manningin visti av, hevði lemmurin í bakborð grivið hol á skipssíðuna, har oljutangin var beint innanfyri. Táið so oljan í tanganum vaks upp til holið í skipssíðuni, sprændi hon út á sjógv. Hetta løgdu teir ikki til merkis beinanvegin. Tí noyddist Brandstøðin í Havn uppí leikin fyri at taka oljuna uppaftur.

Gekk væl

Anfinn Reinert, ið starvast sum innsats-leiðari á Brandstøðini í Havn, sigur, at teir beinanvegin fóru í holt við at fáa tamarhald á oljuni, og hetta gekk væl eftir umstøðunum.

- Tað var eitt frískt lot, og hetta tarnaði arbeiðinum nakað, tí oljan rekur skjótt omaná sjónum. Vit løgdu 150 metrar av flótisperringum fyri at dekka oljuna inni. Kortini rak ein partur inn ímóti Farstøðini og inn í krókin á Bursatanga.

Anfinn sigur, at teir fóru undir at taka oljuna uppaftur seinnapartin sunnudagin, men klokkan var út við 23 sunnukvøldið, áðrenn teir fóru til hús. Mánamorgunin vóru teir aftur á staðnum og tóku oljusperringar upp.

- Vit hava tvey sløg av sperringum, sum vit nýta, tá ið tilíkt hendir. Annað slagið er vanligar sperringar, sum vit brúka, tá ið vit samla oljuna saman. Síðan verður hon sogin upp við slamsúgvara. Hitt slagið er ein eingangs sperring, sum sýgur oljuna til sín. Í hesum førinum brúktu vit bæði sløgini.

Á middegi mánadagin lá enn nakað av olju í krókinum úti við Skipafelag Føroya, men Anfinn Reinert vísir á, at oljan dampast skjótt upp av sjónum, serliga tá ið tað er lýtt í veðrinum.

- Eg vil siga, at tað gekk betur enn væntað at taka oljuna uppaftur.

Innsats-leiðarin á Brandstøðini vil ikki koma við einum boði uppá, hvussu nógv olja lak úr russaranum hendan dagin við Oljukaiuna í Havn.

Nógvar føroyskar landingar í Scrabster

FISKIVINNA
Vilmund Jacobsen

Mikudagin og hósdagin høvdu føroyskir trolarar heilt góðar sølur í Scrabster í Skotlandi og sum skilst, vóru tað serliga hýsan og toskurin, sum seldi væl. Flestu skipini høvdu tó størri nøgdir av toski enn hýsu, men hýsufiskiskapurin hevur eisini verið góður í seinastuni.

Á Norðís Seafood siga tey, at hýsan, sum trolarnir hava fingið, er stór og góð. Hýsan hjá línubátunum er smærri, men er væl nýtilig til flakaframleiðslu.

Øll út í senn

Línuskipini fóru útaftur tiðliga í síðstu viku og koma væntandi innaftur seinni í hesi vikuni. Øll línuskipini fóru at kalla útaftur í senn, tí tey bíðaðu eftir betri streymi.

Sum skilst, er prísurin á hýsu hampiliga góður á Fiskamarkaði Føroya.

- Í morgun varð hýsa 1 seld fyri 21 kr. fyri kg. Hetta var hýsa, sum er landað friggjadagin og verður seld fesk av landinum.

Á Eiði siga tey, at tá ið prísirnir eru so høgir, er vónleyst at keypa.

- Eg vil siga, at føroysku virkini, sum keypa og arbeiða hýsu, hava ikki nógv at gera, fyrr enn prísirnir liggja millum 13 og 16 kr. fyri kg. fyri hýsu 1 og 2.

Hvussu prísirnir á hýsu eru til útflutnings, veldst um, hvussu marknaðurin í Skotlandi er, og hann er aftur tengdur av, hvussu stórt útboðið er.

Serliga upsi

Høvuðsframleiðslan á Norðís Seafood í mars og apríl hevur verið upsi, sum verður skorin til flak og annað, sum tikið verður til. Einki fer til blokk.

Norðís Seafood keypir annars nógva hýsu, tá ið hon er á marknaðinum og fæst fyri líkinda prís. Á virkinum verður hýsan skorin til flak og fryst.

- Vit gera lítið við portiónir, men gera onkrar royndir av og á. Av toski arbeiða vit lítið og einki, siga tey á Eiði.

Á Eiði hevur verið støðugt fiskaarbeiði í vár.

- Vit halda, at útlini eru hampiliga góð, tí fiskiskapurin er góður.

Tó órógvar tað, at so nógv verður tosað um at avtaka 30% regluna fyri sølu um uppboðssøluna.

- Vit halda tað ikki vera skilagott at avtaka hesa reglu, tí vit stúra fyri avleiðingunum, siga tey á Eiði.

Niels Pauli landar í Saltangará

FISKIVINNA
Vilmund Jacobsen

Djúpvatnstrolarin, Niels Pauli, landaði í Saltangará mánadagin. Teir høvdu umleið 2400 kassar tilsamans, harav 1400 kassar var upsi, 600 kongafiskur, og síðan vóru 400 kassar av øðrum, eitt nú hýsu.

Tá ið vit frættu beint fyri døgurða mánadagin, var ikki greitt, hvør keypir lastina hjá Niels Paula, tí fiskurin skuldi seljast um uppboðssøluna. At fiskurin hesaferð skuldi um uppboðssøluna, hevði reiðaríið hjá Niels Paula ikki hugsað um, tá ið teir avgjørdu at leggja veiðina upp í Saltangará.

Fiskavirking í Saltangará lá úti eftir upsanum, men óvist var, hvør keypir.

- Vit arbeiða ikki kongafisk og hýsu; so tann parturin av veiðini fer í hvussu er til onnur virkir, segði Jason Johannesen mánadagin.

Á Fiskavirking í Saltangará hevdu tey 60.000 pund av upsa inni, tá ið arbeiðsdagurin byrjaði mánadagin. Væntandi vórðu tey liðug við hendan fiskin nakað út á seinnapartin.

Upsaprísurin

Um prísin á upsa, sigur Jason, at hann er rættiliga støðugur, hóast upsin yvirhøvur er ógvuliga smáur.

- Eg vil siga, at prísurin fyri tann frægara upsan broytist lítið, kanska eini 10-15 oyru hvønn vegin. Hann liggur úr 5 kr. fyri kg. og uppí 5,60 kr., meðan tann smæsti upin liggur úr 5 kr. fyri kg. og niðureftir, sigur Jason Johannesen.

Nógv herverk í Havn

Hóast næturnar gerast ljósari, so sýnist hetta ikki at hava nakra góða ávirkan á trupuleikan av herverki, sum løgreglan í Havn hevur havt ta síðstu tíðina. Tvørtur ímóti fáa teir fleiri og fleiri fráboðanar, nú næturnar gerast ljósari og fleiri fólk leita sær útum

HERVERK
Ragnhild Ellingsgaard

Seinastu tíðina hevur nógv herverk verið framt ymsastaðni í Havnini, og hetta vikuskiftið var einki undantak í so máta.

- Vit hava fingið fleiri fráboðanar um herverk hetta vikuskiftið, sigur vakthavandi á politistøðini í Havn.

- Hóast næturnar gerast ljósari, so er hetta framvegis ein trupuleiki. Ein skuldi annars hildið, at fólk fingu annað at gera, nú vit ganga mót ljósari tíðin, men so er tíanverri ikki, sigur vakthavandi.

Úti á Argjum var herverk framt móti eini broyt og einum bili, sum stóðu á Spunagøtu. Tveir rútar á bilinum vórðu brotnir, og eisini ein hurð fekk skaða. Seinni fekk løgreglan eisini fráboðan um arbeiðsmaskinur aðrastaðni á Argjum, sum heldur ikki høvdu fingið frið.

- Vit vita ikki enn, sum nakað samband er millum hesi herverk, men vit kanna málið. Í løtuni royna vit at finna fram til fólk, sum møguliga hava sæð okkurt hetta kvøldið, og so arbeiða vit víðari frá tíð, sigur vakthavandi á politistøðini í Havn.

Men tað var ikki bert á Argjum, at herverk varð framt. Onkur rútur á einum bili, sum stóð parkeraður við SMS, varð brotin, og leygarkvøldið boðaði Tórshavnar Sjómansheim frá, at herverk varð framt móti eini hurð.

Bilur stolin av bilverkstaði

STULDUR
Ragnhild Ellingsgaard

Løgreglan í Havn fekk leygarkvøldið fráboðan um ein bil, sum hevði koyrt útav vegnum úti á Velbastað.

- Vit skundaðu okkum út á staðið, men tíanvetur var einki fólk komið til skaða. Eingin var staddur í bilinum, tá vit komu fram, og seinni funnu vit útav, at bilurin var stolin av einum bilverkstaði, sigur vakthavandi á politistøðini.

Fyrr um kvøldið hevði onkur brotið inn á eitt bilverkstað úti á Slættanesgøtu, og inni á verkstaðnum høvdu gerningsmennirnir so funnið lyklarnar til bilin, sum teir fóru avstað við.

- Vit vita enn ikki, hvørjir gerningsmennirnir eru, men vit arbeiða við málinum, siga tey av politistøðini í Havn.

Friðarligt vikuskifti

Løgreglan í Klaksvík hevur ikki havt nógv at gjørt farna vikuskiftið

LØGREGLAN
Ragnhild Ellingsgaard

Klaksvík:

- Hóast veðrið hevur verið framúr, og nógv fólk hava verið úti, so hevur verið stak friðarligt, frætta vit frá politistøðini í Klaksvík.

- Sum heild er langt ímillum, at nakað stórvegis hendir í Klaksvík, og sum oftast fáa vit bara onkrar smærri fráboðanar, sigur vakthavandi á politistøðini. Hann leggur afturat, hóast veðrið gerst betur og fleiri fólk leita sær út í býin um næturnar, so vænta teir sær ikki nógvar trupuleikar av hesum.

13 av 20 starvslønum endaðu í Havn

Mentanargrunnur Landsins lat fyrr í ár starvsløn til 20 listarfólk. Tilsamans er talan um starvsløn í 91 mánaðar áljóðandi 1.721.836,40 krónur

STARVSLØNIR
Ingrid Bjarnastein

Starvsløninirnar fyri 2002 vórðu latnar fyri góðum mánaða síðani. Talan er um 20 listarfólk, ið hava fingið játtað starvsløn í ymisk tíðarskeið. Geografiskt kann ein róliga siga, at starvsløninirnar eru flest allar endaðar í høvuðsstaðarøkinum. Tí av teimum 20 starvsløninunum eru endaðar í Havnini, meðan fýra eru latnar listarfólkum í Keypmannahavn. Tað sigur so mikið sum tað, at bert tríggjar starvsløninir eru latnar listarfólki á bygd, og er tað ávíkavist í Kaldbak, Klaksvík og Saltangará. Ein starvsløn svarar til eina læraraløn í fólkaskúlanum á lønarstigi 21, stig 1.Býtið av starvsløninunum 2002, sær annars soleiðis út:

Teitur Árnason, Keypmannahavn, 32 mánaðir
Sunleif Rasmussen, Tórshavn, 12 mánaðir
Carl Jóhan Jensen, Tórshavn, 12 mánaðir
Edward Fuglø, Klaksvík, 6 mánaðir
Oddfríður M. Rasmussen, Tórshavn, 6 mánaðir
Katrin Ottarsdóttir, Keypmannahavn, 6 mánaðir
Jóanes Nielsen, Tórshavn, 6 mánaðir
Marjun S. Kjelnæs, Hoyvík, 4 mánaðir
Rakel Helmsdal, Tórshavn, 4 mánaðir
Hans Tórgarð, Tórshavn, 3 mánaðir
Katarina Nolsøe, Tórshavn, 3 mánaðir
Kinna Poulsen, Keypmannahavn, 2 mánaðir
Kári Sverrison, Saltangará, 2 mánaðir
Hans Egholm, Tórshavn, 2 mánaðir
Sámal Petersen, Kaldbak, 2 mánaðir
Óli Olsen, Keypmannahavn, 2 mánaðir
Astrid Andreasen, Tórshavn, 2 mánaðir
Tita Vinther, Tórshavn, 2 mánaðir
Gurðið Poulsen, Tórshavn, 2 mánaðir
Berghild Poulsen, Tórshavn, 1 mánaða

Edward Fuglø er ein av teimum trimum av bygd, sum hevur fingið handað starvsløn frá Mentarnargrunni Landsins

GÓÐIR BRÚKTIR BILAR

Nissan Sunny 1,6 Coupé
hvítur, 3 hurðar,
árg. 1986, 305.000 km.
9.000
Nissan Almera 2,0 Diesel GX
grátur, 4 hurðar,
árg. 1997, 151.000 km.
94.000
Nissan Primera 1,6 LX
grátur, 4 hurðar,
árg. 1995, 126.000 km.
59.000
Nissan Primera 2,0
reyður, 4 hurðar,
árg. 1991, 121.000 km.
47.000
Nissan King Cab 4x4 TD
blágrátur, 2 hurðar,
árg. 1998, 55.000 km.
130.000
Nissan King Cab 4x4 Diesel
grátur, 2 hurðar,
árg. 1996.
79.000
Peugeot 306 Diesel Aircon
blátur, 4 hurðar,
árg. 1999, 47.000 km.
125.000
Peugeot Expert 1,9 Diesel
reyður, 4 hurðar,
árg. 1998, 50.000 km.
85.000
Opel Astra 1,6
blátur, 5 hurðar,
árg. 1995, 109.000 km.
67.000
Opel Astra 1,6 Club Wagon
reyður, 5 hurðar,
árg. 1995, 110.000 km.
55.000
Opel Astra 1,7Dti
grátur, 4 hurðar,
árg. 1997, 108.000 km.
99.000
Opel Astra 1,8 Club Wagon
grátur, 5 hurðar,
árg. 1995, 104.000 km.
70.000
Opel Astra 1,6 Club
grátur, 4 hurðar,
árg. 2000.
119.000
Opel Astra 1,8 Club Wagon
brúnur, 5 hurðar,
árg. 1997, 40.000 km.
85.000
Opel Vectra 2,0 DI
beige, 4 hurðar,
árg. 1997, 90.000 km.
117.000
Ford Fiesta
blátur, 5 hurðar,
130.000 km.
22.000
Mazda 323 1,5
grátur, 4 hurðar,
árg. 1998, 56.000 km.
95.000
Mazda 323 F 1,8i GLX
vínreyður, 5 hurðar,
árg. 1996, 116.000 km.
77.000
Seat Cordoba Vario 1,4
blátur, 5 hurðar,
árg. 1999, 25.000 km.
89.000
Toyota Starlet
blátur, 3 hurðar,
árg. 1997, 60.000 km.
85.000

Bilarnir finnast eisini á:
www.nissan.fo

% Meinhardt Arge
v/ eygslarvegin • Postsmoga 3171
110 Tórshavn • Tlf. 31 61 61